

## So feitur hann situr har…

Dagurin í gjár var 26. august og líradagur. Hetta var dagurin, tá ið menn plagdu at draga líra á plássum, har skrápur, sum er gamli fuglurin, reiðrast. Ymsastaðni kring landið verður líri veiddur, men henda veiða er ikki so vanlig sum havhestaveiðan, ið nú stundar til. Tað er nógv minni til av skrápi sum búfugli í Føroyum enn havhesti. Lítið hoyrist og næstan einki sæst til líraveiði í Føroyum. Undir veiði, verður lírin drigin upp úr holuni við króki, sum er festur á ein stívan og boyggiligan jarntráð. Verður fuglurin tikin á nátt, tá ið farið er um líradag, verður gingið við lummalykt eftir urðagrótinum og á grønum blettum, sum eru millum urðagrótið. Mong hava ongantíð sæð ein livandi líra, tí hesin kemur bert út úr holuni, tá ið kvøldarmyrkrið kemur. Tá myrkt er, og tíðin er komin, kemur fuglurin út úr holuni at læra seg at flúgva. Lírin kemur eisini út at taka ímóti skrápinum, sum kemur innaftur av havinum við føði. Tá skrápurin um midnáttarleitið er komin aftur at landi, fara gamli fuglurin og ungin innaftur í holuna. Summi kvøld er meira líri úti; onnur kvøld er minni. Á teimum plássum, har líri verður veiddur, er hetta ein hugnalig og spennandi tíð. Men bert á fáum plássum verður tosað um nakað serligt tal av líra. Líraveiðan hevur ikki nær til tann týdning í húsarhaldinum hjá fólki, sum nátaveiðan hevur. Men væl smakkar hesin feiti biti aftur við dríli og góðum eplum, tá hann er íliðin í salti. **(-vilmund)**

# Hugni og samvera á Trucker-festivali

**- Í mun til festivalin í fjør, tá vit fingu nøkur óheppin avboð, stutt áðrenn tiltakið skuldi byrja, hava vit nú fingið vónina aftur, sigur Leif Eliasen, sum á fimmta sinni hevur staðið aftanfyri Trucker-festivalin, sum var í Runavík leygardagin og sunnudagin**

FESTIVALUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sosialurin va r í Runavík leygardagin, tá bilarnir, sum høvdu tilmeldað seg til Trucker-festivalin, komu út á økið við Ítróttarhøllina.

Tað var váttligt í veðrinum og heldur illfýsið hesa løtu, men vónir vóru um, at líkindini fór at batna út á seinnapartin.

- Vit vænta, at veðrið fer at gerast turrari og fer at blíðka, sum dagurin líður, segði Hugo Skorastein, hjálparmaður hjá fyriskiparanum.

Og rætt hevði Hugo.

Løtu eftir vitjanina í Runavík, sleit hann í eina løtu, og veðrið gjørdist heldur blíðari.

Einir 33 bilar av ymiskum slagi luttóku á Trucker-festivalinum hesaferð.

Tað er klaksvíkingurin, Leif Eliasen, ið stendur sum fyriskipari av festivalinum, og hetta er fimmta árið, at skipað verður fyri tiltakinum.

### Samvera og hugni

Hugo Skorastein læt okkum vita, at hetta eru hugnaligir dagar hjá teimum, sum koyra stórar bilar, bussar og kranar, og hetta er eitt gott høvi hjá bilførarum at hittast.

- Nú flestu túrar um firðir og sund ganga um undirsjóvartunlar, hittast vit sjáldan longur til prát. Áður sóust vit javnan umborð á Strandfaraskipunum, tá vit ferðaðust millum oyggjarnar. Men tíð og umstøður standa ikki í stað, segði hann.

Hugo Skorastein helt, at festivalurin eisini er eitt gott høvi hjá teimum, sum koyra hesar bilar, at "sjeina" bilarnar upp til tiltakið.

- Hetta er í fyrsta lagi eitt hugnaligt tiltak, har vit kunnu savnast til prát í tveir dagar, legði hann aftrat.

Klokkan 16 leygardagin vórðu dyrnar í Ítróttarhøllini í Runavík lætnar upp, og bæði leygardagin og sunnudagin var matsøla og bilaframsýning í høllini.

Øll vóru vælkomin, og tað kostaði einki at koma inn at síggja bilarnar og práta við bilførarar og sølufólk.

Tað vóru bilasølurnar Norðbil og Nordcar, sum sýndu fram sonevndar "potientiellar stjórabilar", meðan Trucker-festivalurin var í Runavík.




*Tað var váttligt og illfýsið í veðrinum, tá bilarnir møttu til Trucker-festivalin í Runavík leygardagin, men sum dagurin leið, gjørdist veðrið blíðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hugo Skorastein, sum hjálpir Leif Eliasen, fyriskipara, er í holt við at vinda fløggini á stong*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Ætlanin var, at NSÍ skuldi hava tivoli á økinum, meðan festivalurin var, men felagið gav – aftur í ár – avboð.

Festivalurin í Runavík helt fram sunnudagin, og seint seinnapartin sunnudagin fóru bilførararnir í Bowlinghøllina í Leirvík til kaffi og køkur.

### Eydnaðist væl

Leif Eliasen, fyriskipari, heldur, at Trucker-festivalurin hesaferð eydnaðist væl. Sjálvandi kundu fyriskipararnir hugsað sær, at veðrið eydnaðist betur, men Leif er væl nøgdur við undirtøkuna, sum festivalurin fekk.

- Í mun til í fjør, tá vit fingu nøkur óheppin avboð, stutt áðrenn tiltakið skuldi byrja, hava vit fingið vónina aftur, sigur hann.

Fyriskiparin sigur, at teir høvdu eitt rímiliga fjølbroytt úrval av akførum við hesaferð.

- Tilmeldaðir vóru 17 lastbilar, seks trekkjarar, tríggir trailarar, tríggir kranabilar, tveir bussar, ein mobilkrani og ein limousina, sigur Leif.

KJ-Hydraulik hevði stóra mobil-kranan við, sum er 200 tons/ metur, og áður hevur kranin hjá Tórshavnar Skipasmiðju verið við, sum er 100 tons/ metur.

- Eg haldi, at mobil-kranin hjá KJ røkkur heilar 60 metrar upp, og tá høvdu teir ikki tað seinasta pettið uppi í krananum, sigur Leif.

Á Trucker-festivalinum ganga teir, sum koyra bilarnar, runt og práta við hvønn annan og hyggja at bilunum hjá hvørjum øðrum.

- Bilarnir verða vístir fram, og menn deila hugskot um, hvussu okkurt kanska kundi verið øðrvísi og betur. Ein stórur partur av degnum gongur í vanligum bilapráti, sum Leif tekur til.

### Seks virðislønir

Fyriskiparin heldur, at eini 100-150 fólk vitjaðu í høllini í Runavík leygardagin og sunnudagin, umframt teir, sum vóru komnir við bilunum.

- Nú fara vit, sum vóru við á festivalinum, at velja vakrastu bilarnar, og hetta verður gjørt um heimasíðuna www.trucker.fo. Kappingin gongur fyri seg í tilsamans seks bólkum, 1) lastbilar – uttan krana og forvogn, 2) kranabilar, 3) bussar, 4) forvognar, 5) trailarar og 6) ársins bilur.

Leif Eliasen sigur, at steypini fyri heiðurin verða handað á eini veitslu, sum ætlanin er at hava síðst í oktober ella fyrst í november.

- Vit hava áður tosað um at hava eina veitslu, og nú brendir so alt á, at hendan verður seinni í heyst, sigur fyriskiparin.

# Útróðrarbátur reið sjógvarnar av sær

ILLVEÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað stóð á gomlum nøglum hjá hesum útróðrarbátinum, sum lá við vestaru síðu á Rókakai í Runavík í tí nógva vindinum um 18-tíðina seinasta fríggjakvøld.

Menn, sum vóru á staðnum, siga, at tað sá einki serligt út, tá ið útnyrðingurin leikaði harðast í, og rættiligur uppgangur var eina løtu.

Útróðrarbáturin hevur maskinbrek, og tí bar ikki til at loysa og flyta hann við egnari megi.

Í løtum sá út til, at báturin næstan endaði upp á bryggjukantinum.

Tað er ikki vanligt, at bátar liggja við vestaru síðu á Rókakai.

Á myndini sæst eisini, at hóast august mánaði enn ikki er liðugur, kann veðrið saktans órógva og gera skaða, um illa vil til.

Men í hesum førinum reið útróðrarbáturin sjógvarnar av sær.



*Væl man vera smíðað, tá hesin útróðrarbáturin helt til viðferðina, hann fekk í storminum seinasta fríggjakvøld*

*Mynd: Charles Jakobsen*